# Gullveitsla í Vestmanna

**Nógv av hondbóltstosinum fer at snúgva seg um Vestmanna hetta vikuskiftið, men fleiri aðrir týdningarmiklir dystir eru eisini á skránni**

HONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*

Fult umfar er í hondbólti um vikuskiftið, og nú fer av álvara at stunda til kappingarlok.

Sjónligasta tekinið um hetta verður helst í Vestmanna. Har hava tey longu fingið staðfest, at kvinnurnar eru tær bestu í landinum, og sunnudgain skulu menninir so ætlandi gera teimum kynstri eftir, tá Neistin kemur á vitjan. Ein sigur her ger VÍF til meistarar, og so er einki at ivast í, at bæði Bryggjan og la Carreta verða stúgvandi full.

Umframt teir báðar dystirnar millum VÍF og Neistan, so verða eisini fýra aðrir dystir á skránni, og serstakliga í teimum báðum kvinnudystunum er tað alt annað enn gull og skreytlutir, sum eru fremst í huganum.

Á Giljanesi bresta Sóljan og StÍF saman, og fyri báðar partar er her talan um ein dyst, sum kann hava lívbjargandi týdning, um stig fáast til høldar. Soleiðis er eisini hjá Kyndli, sum á heimavølli tekur ímóti VB. Júst hesin dysturin var í grundspælinum tann, har Kyndil sýndi, at tær kunnu megna annað enn leiklutin sum botnlið, og skulu tær sleppa úr hesum leikluti, er av alstórum týdningi, at tær nú endurtaka sigurin á VB.



*Vestmenningar kunnu staðfesta næsta gullmerkið innan fýra dagar, um tað eydnast monnunum at vinna dystin móti Neistanum sunnudagin*

Hjá monnunum eigur Kyndil somuleiðis heimavøll, tá teir skulu royna seg móti hovyíkingum. Her hevur Kyndil staðið seg væl betri í endaspælinum, og mugu tí metast sum favorittar, men ein grannauppgerð er tó ein grannauppgerð, og tí kann einki takast fyri givið.

Tað kann tað heldur ikki í Runavík, har Tjaldur tekur ímóti StÍF. Her er somuleiðis talan um grannauppgerð, og við óstøðugu avrikunum, sum liðini hava víst í ár, er at kalla alt hugsandi, og skal nakað takast fyri víst, so er tað helst, at tað neyvan verður keðiligt.

# Útlendingarnir rúmari ræsur

**Tá spæliloyvi hevur verið í Føroyum í trý ár á rað, verður spælari ikki longur taldur við útlendingakvotuni**

KAPPINGARREGLUR
*Jóannes Hansen*

Møguleikin fyri at hava útlendskar spælarar í liðnum verður nú størri hjá føroysku fótbóltsfeløgunum, enn áður hevur verið hildið. Allar 22 atkvøðurnar á aðalfundinum hjá Fótbóltssambandinum, sum varð hildin í Norðurlandahúsinum síðsta leygardag, tóku undir við hesum.

Nevndin í FSF mælti aðalfundinum at taka undir við uppskotinum. Tað gongur út uppá, at markingin ella definitiónin av, hvat ein útlendskur leikari er, skal broytast.

Áður hevur staðið í grein 18, at sum útlendskur leikari verður roknaður persónur, ið ikki hevur fast tilknýti til Føroyar, og sum ikki hevur fastan bústað í Føroyum seinastu trý árini frammanundan, at umsókn um loyvisbræv verur latin Kappingarnevndini.

Nú verður skoytt uppí, at útlendskur leikari, sum burturav hevur havt spæliloyvi at leika í Føroyum í minsta lagi í trý fylgjandi kappingarár, og sum hereftir 4. kappingarárið á rað søkir um spæliloyvi, kemur ikki undir reglurnar um útlendskar leikarar.

Onkuntíð hava ivamál staðist av, hvussu tað skal skiljast við fasta bústaðinum, tá spælarar hava veirð í Føroyum frá fyrst í februar og til fyrst í oktober, meðan familjurnar hjá teimum fyri tað mesta hava verið í landinum, sum teir hava verið ættaðir úr.

Í viðmerkingini til broyttu ásetingina sigur FSF, at reglan bert er galdandi, tá ein spælari hevur spælt í Føroyum í trý kappingarár á rað, og at umsóknin um spæliloyvii 4. árið verður latin FSF sum eitt framhald av hesum samanhangandi tíðarskeiði. Tað vil við øðrum orðum siga, at tað ber ikki til at uppsamlað tíð frá undanfarnum kappingarárum, har spælarin við hvørt hevur verið í Føroyum og onnur tíðarskeið hevur verið í útlendskum feløgum.

### Fleiri fáa ágóðan

Í 1999 samtykti FSF aðalfundurin, at hámarkstalið á útlendskum spælarum skuldi økjast úr tveimum og upp í fýra. Broytingin hevði við sær, at útlendingatalið í bestu deildini hækkaði í 1999 og 2000. Men í fjør fór tað at ganga hinvegin. Tá vóru tjúgu fremmandi spælarar í bestu føroysku deildini, meðan talið í 2000 var tredivu.

Feløgini, sum í 2001 høvdu flestar útlendskar spælarar á liðnum vóru VB, B68 og FS Vágar. Vágbingar høvdu fýra útlendskar spælarar, og toftamenn og vágamenn høvdu tríggjar útlendskar spælarar í part.

Í fjør vóru tað bara B36 og HB, sum ongar útlendskar spælarar høvdu á besta liðnum. Havnarliðini hava í fyrireikingunum til komandi kappingarárið gjørt sáttmálar við útlendskar spælarar.

Fleiri útlendskir spælarar hava spælt fótbólt í Føroyum seinastu trý árini, og summir teirra hava veirð í heimlandinum í vetrarsteðginum. Vit kunnu t.d. nevna Krzystof Popczynski, sum hevur verið í Vági, og sum nú er í Gøtu. Marek Wierzbicki, sum man vera tann útlendski spælarin, sum hevur verið longst í Føroyum, Andrzej Pacek, sum kom til Klaksvíkar í 1999, og sum í fjør var í B36 og EB/STreymi, Marlon og Marcello í B68 og Iulian Florescu, sum ehvur verið á Sandi, og sum nú hevur gjørt avtalu við B36.

## Dystir um vikuskiftið

### Hondbóltur

| | | |
|---|---|---|
| **1. deild kvinnur** | | |
| 03.03 | 14.30 | Sóljan-StÍF |
| 03.03 | 14.30 | Kyndil-VB |
| 03.03 | 14.30 | VÍF-Neistin |
| **1. deild menn** | | |
| 03.03 | 16.00 | Kyndil-H71 |
| 03.03 | 16.00 | Tjaldur-StÍF |
| 03.03 | 16.00 | VÍF-Neistin |

### Flogbóltur

| | | |
|---|---|---|
| **Meistaradeild kvinnur** | | |
| 02.03 | 13.00 | Mjølnir-TB |
| 03.03 | 13.00 | TB-ÍF |
| **Meistaradeild menn** | | |
| 03.03 | 14.00 | SÍ-Fleyr |
| 03.03 | 15.00 | ÍF-Mjølnir |

# Tær megnaðu tað



*Jørleif Kúrberg var seinkaður um Leirvíksfjørð, men hóast hetta, so bar hann ongan ótta fyri, at genturnar ikki skuldu vinna dystin*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

**Hóast hann sat eftir í Leirvík, so ivaðist Jørleif Kúrberg ikki í, at VÍF kvinnurnar vóru nóg stinnar at standa seg einsamallar**

HONDBÓLTSTOS
*Jákup Mørk*

Sum tað framgongur aðra staðni í blaðnum so var Jørleif Kúrberg ikki komin vegin fram til Klaksvíkar, tá VÍF hóskvøldið fór undir dystin, sum ætlandi skuldi tryggja teimum gullmerkini.

Tá vit eftir dystin fingu orðið á Jørleif, ásannaði hann, at tað ikki var serliga hugaligt, soleiðis at sita og bíða, uttan at fáa gjørt nakað sum helst við støðuna.

–Nei. Tað var so einki serligt. Tað stuttliga við tí var, at eg helt dystin akkurát vera byrjaðan, tá vit so komu í høllina. At í mesta lagi eitt korter var leikt. Tá dómararnir so stutt eftir steðgaðu spælinum, skundaði eg mær at rópa leikararnar yvir til mín, tí eg helt, at talan var um time-out, men tá var to so longu hálvleikur.

### Ikki bangin

Hóast hann soleiðis ikki fekk givið nøkur ráð til leikararnar undan dystinum, so bar venjarin ongan ótta fyri, at talan skuldi gerast um tap.

–Eg helt, at har eru so nógvar rutineraðar gentur á liðnum, og tað skuldu tær nokk eisini klára. At Agga so eisini hjálpti til við útskiftingini, hjálpti eisin til, og tað vísti seg eisini at ganga, segði seinkaði venjarin at enda.



KÍF-VÍF 29-30 (16-13):

# Aftur tepurt

**Vestmenningar vunnu eisini seinnu grannauppgerðina móti KÍF í endaspælinum, og aftur hesa ferð var munurin eittans mál**

HONDBÓLTUR – MENN
*Jákup Mørk*

Talan varð nærum um rokdyst, tá VÍF tíðliga í endaspælinum tryggjaði sær tvey stig móti kollfirðingum í einum sera spennandi dysti, sum varð avgjørdur við seinasta skotinum í dystinum.

Hóskvøldið hittust liðini aftur, og tó at talan ikki varð um seinasta skotið, sum varð avgerandi, so var talan aftur um ein sera spennandi dyst, sum eisini hevði nakað av dramatikki við.



*Tað var enn eina ferð um reppið, men endin varð kortini, at VÍF vann grannauppgerðina, og nú er guli herurin bert ein dyst frá gullmerkjunum*

### Stóð nógv á

Tað var nevnliga sera, sera javnt allan dystin. Vestmenningar vóru kanska teir, sum byrjaðu betri, men tað var tó rættiliga skjótt, at kollfirðingar fingu fatur á tærra endanum. Serstakliga sótu skotini hjá teimum báðum útlendingunum, Durica og Iljan, væl, og áðrenn nakar veruliga vardi tað, vóru kollfirðingar brádliga á odda.

Hetta skuldi eisini vísa seg at vera ein leiðsla, sum skuldi halda megin partin av dystinum. Vestmenningar stríddust at koma inn aftur í dystin, men hvørja ferð teir fingu togað nakað inn, svaraðu kollfirðingarnir aftur. Ikki fyrr enn kollfirðingarnir fyrst fingu Vagn Johannesen tveittan heilt út, og síðani fingu eina vanliga útvísing stutt eftir, fór at bera til hjá oddaliðnum. Teir megnaðu at koma framum, men framvegis stóð nógv á. Eitt og tvey mál var munurin tað, sum eftir var av dystinum, og fram móti dystarenda gjørdist rættiliga heitt, tá Rógvi Nielsen fekk beinleiðis reyða kortið.

Leiðslan helt tó allan vegin á mál, og enn einaferð kundu vestmenningar fegnast um ein tepran sigur, meðan kollfirðingar hinvegin enn eina ferð kundu iðra seg um eitt eins tepurt tap.

### Ein restar

Við sigrinum tryggjaðu vestmenningar sær, at tað nú veruliga er lagt upp til eina sanna veitslu, tá Neistin kemur á vitjan um vikuskiftið. Sum er, so kann Neistin røkka 30 stigum, men verður talan um heimasigur hjá VÍF, so verður hetta minkað niður í 28, samstundis sum VÍF tá hevur 29 stig.

Við øðrum orðum, so merkir ein sigur til VÍF sunnudagin, at teir eins og kvinnuliðið verða meistarar annað árið á rað, og so munnu bæði spælarar og áskoðarar leggja vertin á, at tað mangan hevur riðið um snarið, tá á pappírinum lættir dystir hava verið leiktir. VÍF er mest sum hvørja ferð farið av vøllinum við báðum stigunum, og fram um alt, so eru tað hesi, sum telja.

### Dysturin í tølum

**KÍF-VÍF 29-30 (16-13)**

Málskjúttar:
KÍF: Durica Tomic 9(3), Iljan Topic 7, Kristian Madsen 5, Eddie Joensen 2, Vagnur Johannesen 2, Rógvi Weihe 2, Jákup Dam 1, Petur Martin Poulsen 1
VÍF: Sámal Joensen 12(5), Áki Olsen 5, Agnar Joensen 3, Piti Negru 3, Petur Fr. Joensen 2, Daniel Rápa 2, Harald Bjørgvin 1, Ragnar Zachariasen 1, Rógvi Nielsen 1
Brotskøst: KÍF 4, VÍF 3
Útvísingar: KÍF 2, VÍF 2
Diskvalifikatión: KÍF 1, VÍF 1 (Báðar beinleiðis reytt)
Dómarar úr Neistanum/Kyndli: Kristian Johansen & Niels Viggo Niclasen.

# Venjarin hjá Hull hevur sagt upp

**Skelkurin var stórur í Hull, tá venjarin seinastu trý árini, Brian Little, saman við tveimum hjálparvenjarum segði seg úr starvinum**

ÚTISETAFELAG
*Jóannes Hansen*

Í Hull søgdu teir, at tað kom sum ein bumba, tá venjarin segði seg úr ábyrgdarstarvinum fyri besta fótbóltsliðnum.

Brian Little hevur havt ábyrgdina av Hull liðnum síðani í apríl 2000. Hann er kendur venjari í Onglandi. Teir í Hull hava kent tað sum ein forrætt, at venjarin hjá teirra liði hevur verið ein, sum áður hevur havt ábyrgdina av Aston Villa, Leicester, Wolverhampton og Stoke. Men nú er Brian Little ikki venjari hjá Hull.

Á fundi við formannin í felagnum, Adam Pearson, hósdagin, boðaði Brian Little frá, at hann fer úr starvinum. Somu boðini komu frá hjálparvenjarunum báðum.

Hull formaðurin segði í tíðindaskrivinum, sum varð sent út eftir fundin, at hann var sera vónbrotin av hesum. At hann ikki hevur skundað undir uppsøgnina kom til sjóndar í mikudagin, tá hann avgjørdur noktaði fyri, at tað í nevndini varð hugsað um at siga venjaranum úr starvi.

### Skeiva vegin

Í Hull hava teir ásannað, at møguleikin fyri beinleiðis uppflyting í triðbestu deildina er fokin. Teir hava vónað, at tað kortini skuldi eydnast at vinna uppflyting í endaspælinum, men gongdin hevur ikki verið sannførandi síðstu.

Mett verður at dropin, sum fekk bikarið at flóta yvir hjá venjaranum, var, tá teir fríggjakvøldið taptu 1-0 á heimavølli móti einum av botnliðunum. Kappingarárið byrjaði sannførandi hjá Hull. Venjarin brúkti 800 túsund pund til nýggjar spælarar, og úrtøkan var stór. Men so fór at ganga hinvegin. Kring ársskiftið spældu teir sjey dystir á rað uttan at vinna, og nú eru teir smokkaðir niður á sjeynda plássið.

Tað var Brian Little, sum 14. juni í fjør keypti Julian Johnsson frá Sogndal og til Hull. Í kapping við sjey aðrar eydnaðist tað Juliani beinanvegin at sannføra venjaran um, at hann átti at vera sjálvskrivqaður til annað sentrala miðvallarplássið.

Juilian er sáttmálabundin við Hull í meira enn enn eitt ár afturat. Hvussu tað nú verður við fasta plássinum verður upp til nýggja venjaran at gera av. Ofta plaga nýggir venjarar vilja sleppa at seta dám á liðið, sum teir fáa ábyrgdina av. Tí kann roknast við, at Hull fer at selja onkrar spælarar, og at aðrir spælarar fara at verða keyptir til felagið. Men nú fáa vit at síggja, hvussu tað verður við tí. Fríggjadagin var ikki greitt, hvør nú fer at hava ábyrgdina av Hull liðnum, men sagt varð tó, at ungdómsvenjarin, Billy Russell í fyrstu atløgu tekur sær av venjingunum.

Neistin-Sóljan 29-21 (15-8):

# Hava nú silvurið í hondini

**Í einum fyri Neistan óvanliga málríkum dysti vunnu tær bláu tryggan sigur á Sóljuni, og halda sostatt framvegis kósina móti silvurmerkjunum**

HONDBÓLTUR – KVINNUR
*Jákup Mørk*

Aðru ferð í ár spældu bestu neistakvinnurnar landskappingardyst í Gundadalshøllini, men hesa ferð var úrtøkan heldur betri enn seinast, tá tær greitt vóru við undirlutan móti Stjørnuni.

Mótstøðuliðið hesa ferð var Sóljan, sum alt árið hevur stríðst í botninum av stigatalvuni, og mett eftir dystinum hóskvøldið, fer hetta stríð at standa við fram til kappingarlok.

### Gjørdu skjótt av

Tað var nevnliga heilt skjótt greitt, at Neistin ikki ætlaði, at nakað stórvegis roks skuldi vera um, hvønn veg stigini skuldu fara. Meðan gestirnir bert funnu málið ta einu ferðina fyrstu 10 minuttirnar, so hevði Neistin skorað átta ferðir, og so var tann dysturin sum so avgjørdur. Tað hoyrir tó til søguna, at Sóljan samstundis brendi tvey brotskøst, men tað skal tó ikki taka nakað frá neistaavrikinum.

Sum vera man, so førdi tryggja leiðslan við sær, at tær á heimaliðnum fóru at taka nakað lættari upp á uppgávuna. Allar fingu møguleikan at royna seg, og atlit varð tikið til stóru uppgávuna nú sunnudagin, tá útidysturin móti nýklæktu meistarunum úr Vestmanna verður á skránni.

Soleiðis var gongdin eisini í seinna hálvleiki, har Neistin ikki fekk økt stórvegis um munin. Hinvegin var heldur ongan tíð vandi fyri, at sigurin skuldi gleppa teimum av hondum.

### Spenningurin heldur

Við sigrinum slapp Neistin upp á næst ovasta sessin í deildini, men spurningurin er so, hvussu leingi tær verða verandi á hesum. Vandin fyri at missa er eingin sunnudagin, tá Stjørnan hevur frí, meðan Neistin hittir VÍF. Hinvegin verður spenningurin stórur annað vikuskiftið. Tá kemur Stjørnan til Havnar, og soleiðis sum kappingin hevur háttað seg, so er líkt til, at tað verður vinnarin av hesum dystinum, sum ognar sær silvurmerkini.

Hjá Sóljuni er tað sjálv tilveran í bestu deildini, sum stendur upp á spæl komandi dystirnar. Fyrst kemur StÍF á vitjan, og eftir at Sóljan síðani vitjar í Vági, er tað Kyndil, sum kemur á Giljanes. Hartil skal útsetti dysturin móti StÍF helst eisini avgreiðast onkursvegna, og fyrst og fremst eru tað hesir tríggir dystirnir, sum fara at gera av, hvørt Sóljan komandi árið skal spæla í aðru deild, ella um hesin lutur verður latin antin Kyndli ella StÍF. Tað kann væl vera, at spenningurin um ovasta sessin er farin, men í botninum er enn einki avgjørt. So langt ífrá.

### Dysturin í tølum

**Neistin-Sóljan 29-21 (15-8)**

Málskjúttar:
Neistin: Katrin á Neystabø 6, Mildrið Jacobsen 6, Gunnleyg Berg 5(2), Birita Wardum 4, Susan Brockie 3, Súna Mørk 2, Ata Høgnadóttir 1, Rakul Augustinussen 1, Kára á Dunga 1
Sóljan: Asta Petrauskiene 11, Marjun Johansen 4, Jana Jacobsen 2, Heidi Maria Akselsen 2, Petra Thomassen 1, Fía Selma Nielsen 1
Brotskøst: Neistin 3, Sóljan 3
Útvísingar: Neistin 1, Sóljan 1